# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 17.sept. 2018<br>Tíð:kl 16.00 – 18.00 | Luttakarar: Allan, Vivian, Jóhan, Súsanna, Bjørghild og Marjun<br><br>Ikki møtt:Bergunn |
|---|---|

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi (A) | Seinasta fundarfrásøgnin varð undirskrivað. | AM |
| 2. | Skúlabyrjan | Tað var komin ein fráboðan um at foreldur vóru misnøgd um, at skúladagurin var so stuttur fyrsta dagin. Tað var grundað á at ongin ansing var eftir tíðina í skúlanum. Fyrsti dagur er øgiliga pressaður uppi í grunddeil, tí vit taka ímóti nógvum fólkum, so praktist ber ikki til at hava skúladagin longri henda eina dagin um árið.<br>Fyrsta vikan, tá ið krúnprinsahjúnini og børn teirra vóru á vitjan var sera spennandi. Framførðslurnar gingu væl og allir næmingar vóru við í tiltakinum, sum øll kláraðu sera væl.<br>Vallærugreinarnar í 8.fl er týskt, alis/ evnafrøði, heimkunneiki og motorlæra. Tað eru so nógvir tímar á tímatalvni at næmingar hava huga at leypa frá. Tað er ikki pláss fyri valskúla tá tímatalið á kravdum lærugreinum er so høgt.<br>Serøkið er sera væl skipað. Frágreiðing um, hvussu lesi- og rokniskeið eru skipaði í grund- og miðdeild. Í hadeild er triði lærarin lagdur inn í blokkarnar í føroyskum, donskum og støddfrøði, hetta er gjørt fyri at gagnnýta tímarnar betur.<br>Tað bleiv víst á við einum tímayvirliti, hvussu nógvir flokkar eru og svimja í Gundadali. Tað er sera trongligt, tí er tað ein avbjóðing at fáa eina svimjiundirvísing í lag yvurhøvur. Ætlanin er at flokkarnir sum svimja um somu tíð skulu royna at gera eina sínamillum avtalu um nær á árinum tey svimja. | MH |
| 3. | Ferðslulæra í fólkaskúlanum | Vivian hevur sent ein fyrispurning inn viðvíkjandi ferðslulæru.<br>Ferðslulæran er nógv í yngru flokkunum 1- 3.fl og síðan er ein dagur á Ferðslutrygd í 8.flokki. | VJ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | Í miðdeildini hevur stundum verið gjørt nakað burtur ú at súkkluni, annars er tað ein mangul at taka hetta evni upp í eldru flokkunum. Hádeildin er sum er, ofta avbrotin av øðrum tiltøkum sum treingja seg inn í fólkaskúlan. | |
| 4. | Hvar liggur málið um Argjaskotið? | | Í innskallingini hava stýrislimirnir fingið aftursvarið frá kommununi sendandi.<br>Skrivið er sent stjóra og Námsfrøðiliga ráði til hoyringar og hava hesir partarnir svarað MMR aftur.<br>Nú liggur málið hjá MMR og bíða vit nú eftir eini niðurstøðan verður gjørd.<br>Útbyggingin av frítíðarskúlanum er farin í langdrag, tí TG-verk er farið av landinum. Tað hoyrist onki um, nær hetta arbeiði fer í gongd, so eingin veit nakað. | MH |
| 5. | Støðan í bygninginum | | Ein partur av vindeygunum stendur fyri at verða skiftur, hetta arbeiði skuldi verið farið í gong dum ársskiftið.<br><br>Fasadan bíðar eftir at trætumálið um ábyrgdina verður avgreitt. Hetta er farið í langdrag, tí partanir eru ósamdir<br><br>Takið skal eisini umvælast, her er eisini træta um ábyrgdina. Støðan er tann nú at ábøtur verða gjørdar so hvørt lekarnir vísa seg. | MH |
| 6. | Kunning | | Bjørg Danielsen hevur boða frá at hon tekur seg úr skúlastýrinum eftir at hava sitið sum umboð í 10 ár.<br><br>Súsanna Vang Toftegaard er komin inn sum foreldra umboð í skúlastýrið. | |
| 7 | Ymiskt | | Skúlastýrisfundir eru 22.okt, 26.nov, 21. jan,( jólaborðhald) 25.feb. og 25.mars<br><br>Tosaðu um felagsforeldrafundir. Foreldrafundirnir verða nú skipair á deildunum við einum evni, sum er eitt sindur meinlíkt felags foreldrafundunum. | |